


# Longri siglandi í Arktis

Deil:

**Jan Müller**

13.08.2014 - 09:38

Oljan.fo

Møguligt verður í framtíðini at sigla væl longri á siglingarleiðunum í Arktis enn í dag. Orsøkin: ísurin er bráðnaður enn meira. Tað veit Weathernews at siga.

Japanski kappingarneytin hjá danska DMI, Waternews metir í eini nýggjari greining, at siglingartíðin á báðum høvuðsleiðunum í Arktis verður munandi longri longu í ár í mun til í fjør, og tann gongdin fer at halda fram.

Mett verður, at siglast kann ein heilan mánað fyrr enn higartil. Tvs. at kunnu sigla fram við Ruslandi ella Kanada uttan at koma í havís.

Umleið 400 skip hava søkt um at sigla á hesum leiðum.